




## Stuðul hjá stuðlinum..

Fleiri av gestum okkara, sum hava serligan tørv, vitja saman við stuðli, og summir vitja í onkrum bólki við einum ella fleiri leiðarum. Vit eru altíð til taks at hjálpa leiðarum og fakfólki. Her hjá okkum eru tit ongantíð einsamøll. Umframt samband okkara við læknar og sjúkrahús, hava vit støðugt nógv starvsfólk á staðnum, og flestu teirra tosa føroyskt. Vit hava eisini eina vakttelefon, sum svarar á føroyskum allan sólarringin.

## ...úr Vágum í Vágar

Vitjanir okkara byrja og enda á flogvøllinum í Vágum. Vit hava starvsfólk bæði har og í Alicante eins og umborð á flogførum og bussum.










